# Kann feskfiskaveiðan við Føroyar verða 95.000 tons um árið

FISKIVINNA
*Óli M. Lassen*

Greiningin sum Sosialurin her hevur gjørt, vísir at feskfiskaveiðan eftir toski, hýsu, upsa, brosmu, longu og blálongu við Føroyar, hevur tey seinastu 34 árini, umroknað sum miðalveiða, verið á leið 95.000 tons árliga. Men sum talvan eisini vísir, so eru tað sveiggj í fiskiskapinum uppá meira enn 60.000 tons. Nevniliga millum 60.000 og 120.000 tons. Talvan vísir eisini at vit fiskaðu eins nógv miðskeiðis í 1970 ´unum og 80´unum sum vit gjørdu árini 2002 til 2003. Spurningurin er so hvussu kunnu ella skulu vit raka miðalfiskiveiðuna

Talvan vísir greitt, at tá botnfiskaveiðan kemur áleið tey 120.000 tonsini so fellur hon aftur. Sum víst á aðrastaðni í blaðnum í dag, so er talan um fallandi veiðu undir Føroyum sæð í søguligum ljósið. Spurningurin er so hvat politikarar og fiskifrøðingar ynskja skal fiskast við Føroyar; skal tað verða 80.000 tons um árið ella 100.000 tons ella ein heilt onnur miðalveiða.







Sum talvan vísir, so er tað greitt, at fiskiskapur broytist óansæð hvønn fiskiflota vit hava, og sigast kann at feskfiskaflotin er nógv broyttur frá 1971 og fram til í dag. Fiskimannafelagið og formaður felagsins Óli Jacobsen hevur gjørt eitt stórt arbeiði við at greina ICES frágreiðingar og vísa á skeivleikarnar í hesum álitunum. Tó eru hesu álit framhaldandi týðandi grundarlag undir Føroyska fiskivinnupolitikkinum og kunnu vit spyrja um samfelagið hevur ráð til hetta.

### Neyðugt við skilagóðari ráðgeving

Óli Jacobsen vísir í FF blaðnum á, at skipanin við fiskidøgunum virkar til fulnar og prógvar hann við tølum, at er lítið til av fiski verður fiska minni og er stovnurin væl fyri so verður eisini fiskað meira.

Sum talvan her vísur so eru stór sveiggj í fiskiskapinum eftir ymisku fiskasløgunum. Og kunnu hesar broytingar ikki tilskrivast broytingar í veiðuorkuni eina.

# Fiskivinnugransking við eitt vegamót

FISKIVINNA
*Óli M. Lassen*

Tað er eingin ivi um, at tann fiskivinnugransking við hava sæð tey seinastu árini ikki megnar at fáa tilvega rætta mynd av livi-umstøðunum í sjónum. Spurningurin er eisini hvussu vit kunnu tað, tá í bóndin ið sáar markina jú heldur ikki kann siga hvat hann hestar. Her eru viðurskiftir sum ov nógv regn, ov nógv sól og túrkur, ella skaðadjór v.m. At halda at nakrar yvirlitstrolingar, nitrukanningar og gróðurkanningar við meira, ið byggja á eitt veikt hagfrøðisligt tilfar kann siga okkum hvussu nógv vit kunnu veiða av einum fiskastovni hvørt ár er naivt at halda. Tó er eingin ivi um, at tann vitan fiskifrøðingar savna, er sera áhugaverd og kann verða partur av tí grundarlagið fiskivinnupolitikkurin skal byggja á, men kann hetta ikki standa aleina.

Tann háttur ið nýttur verður gevur ikki eina nágreiniliga og úttømandi vitan um hesu viðurskiftir, og er tað neyðugt at menna okkara fiskivinnugransking, so at hendan veruliga kann verða grundarlag undir haldgóðum forsøgnum. Tað teoretiska arbeiði má styrkjast munandi og má ein faklig greining gerast millum stovnstrýst, veiðuorku og veiðutrýst.

Í Føroyum eru Feskfiskaflotin so lítil at møguligt er ítøkiliga at gera metingar av broytingunum í veiðuorkuni hjá einstøku skipabólkunum og skipunum um man ynskir tað.

### Fiskimenn & fiskifrøðingar samdir

Trupulleikin í Føroyum er, at sjálvt fiskimenn halda, at nakrir línubátar ella línuskip eru við til at oyða grunnarnar við Føroyar. At halda at til dømis 5 Línuskip ella 4 partrolarar og 2 djúpvatnstrolarar og 20 útróðrarbátar meir ella minni eru við til, at oyða fiskivinnumøguleikarnar við Føroyar er heilt burturvið. Heldur er talan um at plássið hjá verandi flota gerst trongligt og harvið ávirkar hetta eisini veiðumøguleikarnar. Tað eru heilt aðrar náttúrukreftir, ið hava nógv størri ávirkan á livilíkindi og fiskivinnumøguleikarnar við Føroyar, enn ein lítil broyting í samansetingini av flotanum. Hetta prógvar fiskivinnusøgan til fulnar, her er neyðugt at sláa kalt vatn í blóðið og viðurkenna at fiskur hevur stert og kemur og fer. Samstundis sum vit mugu ásanna at veiðan seinastu árini ikki er annarleiðis enn í 1970´unum og 80´ unum.

### Fiskivinnan og fjølmiðlarnir

Samfelagið og fjølmiðlarnir sum heild hava ikki megna at fyrihildið seg til, at vinnan hevði nøkur góð ár og at 1996 og 1997 vóru avbera góð ár til tosk og aftur í 2002 og 2003 var góður fiskiskapur eftir toski. Talvan vísir til fulnar hvussu toskafiskiskapurin broytist og sum áður nevnt skal annað og meir til enn ein forkláring um broytt veiðutrýst.




